# Farin í ferðavinnuna

*Klædnahandlarin úr Havn, sum ætlaði at selja vatn úr Suðuroy, er fyribils endaður sum nevndarformaður fyri eini danskari frítíðarmiðstøð*

Edvard Joensen

Kári Müller, sum nógv kenna frá klædnahandlinum Feðgum í SMS, er nú farin upp í danska ferðavinnu. Hann er nevndarformaður í eigarafelagnum, sum eigur frítíðarstaðið Hotel Skagen Strand í Hulsig í Norðurjyllandi.

Talan er um eitt »kompleks«, har til ber at keypa seg inn sum partaeigara. Eitt sonevnt »time share« tilboð. 430 persónar og fyritøkur eru partaeigarar, sigur Kári Müller. Umfram privatpersónar eru nevniliga fleiri fyritøkur, sum keypa hús og íbúðir, sum starvsfólkið so brúkar í síni frítíð, sigur hann.

Kári Müller sigur, at hann flutti til Hulsig, sum liggur beint sunnan fyri Skagen, í juni mánaða í fjør. Hann vildi hava frið og líkasum koma eitt sindur av vegnum, sigur hann.

Men er tað nakað, sum Kári klárar at ganga uttan um, so er tað friður. Hann keypti eitt av húsunum, og á aðalfundi í eigarafelagnum, sum hildin varð 15. apríl í ár, varð einasti føroyingurin í »selskapinum« einmælt valdur til nevndarformann.

Hetta staðið, sum Kári Müller nú er nevndarformaður fyri, liggur við eystsurstrondina í Norðurjyllandi út móti Kattegat.

Har er alt, sum til eitt slíkt stað hoyrir, sigur Kári nevndarformaður. Baðiland, fótbóltsvøllur og ørgrynni av øðrum ítróttartilboðum til gestirnar, veit hann at siga. Og sera barnavinarligt er eisini, greiðir Kári frá.

Staðið er rættiliga nýtt. Fyrstu húsini vórðu bygd fyri 12 árum síðan, og tey nýggjastu eru bara tvey ára gomul. Har er ljóst og væl útgjørt innandura við øllum, sum til eina nýmótans íbúð hoyrir.

Staðið verður leigað út til vanlig ferðafólk, sum vera man. Týskarar, norðmenn, sviar og københavnarar, sigur Kári, sum tó saknar føroyingarnar.



*Eitt tað seinasta, sum frættist frá Kára, áðrenn hann flutti úr Føroyum, var tá trappustríðið við Tórshavnar Býráð var fyri*


Skálabúðin

1945 - 2000

55 ár








Í sambandi við, at tað eru 55 ár síðani klædnahandil byrjaði í húsinum, bjóða vit kaffi og køkur frá morgunstundini av.

Mánadagin 15. mai

Eisini hava vit nógv góð tilboð bæði í Skálabúðini og í Mótaskálanum.

Hjartaliga vælkomin!

Skálabúðin

Dr. Jakobsensgøta 21 - Tel 315315


# Forboð móti kloning

Norðurlendskt forboð ímóti kloning eins og aðrir spurningar á lívrættarliga økinum verða umrøddir á ráðstevnuni »Ein norðurlendsk dimensjón í lívsiðafrøðini«, sum Norðurnevndin í Norðurlandaráðnum saman við Norðurlendska lívsiðafrøðiliga ráðnum skipar fyri í Stockholm tann 16. mai.

Ráðstevnan er ein liður í viðgerðini av einum limauppskoti, sum greiðir frá stórari óttan í sambandi við sera skjótu menningina á lívtøkniliga/lívtekniska økinum og vantandi politiskari stýring á økinum. Serligur ótti er knýttur at tørvinum á samskipaðari lívrættarligari lóggeving. Millum annað verða framtíðar norðurlendskar strategiir og norðurlendskt samstarv til umrøðu á ráðstevnuni.

Úr Føroyum luttaka tingmenninir Jógvan við Keldu (Fólkafl.) og Dan R. Petersen (Javnaðarfl.), sum báðir eru limir í Norðurnevndini í Norðurlandaráðnum.

## Til minnis um John Sigur Dahl Olsen

f. 02.12.1980 – d. 03.02.2000



Tung vóru boðini at fáa, at John ikki longur var ímillum okkum. Hann, sum altíð var væl upplagdur og í góðum lag.

Vit kendust best sum børn, tá vit plagdu at spæla saman í Hósvík men hóast vit ikki hava verið eins nógv saman, síðan vit vuksu til, eru bert góð minnir um John. John visti altíð onkra stuttliga støgu og hann visti onki betur, enn at fáa okkum at glenna, so vit høvdu nógvar skemtiligar løtur saman. Serliga tá vit fýra og Sunnleif skuldu gera orkestur, vit vóru so spent og øll høvdu okkurt at spæla uppá, John skuldi spæla munnharpu, tí hann átti eina sjálvur.

John var altíð tilreiðar at hjálpa við øllum, ið skuldi gerast, við seyðinum og hoyggingini. Eisini tá tit bæði fóru til Danmarkar við Arnbjørn, tá tók John sær av øllum heima. Tí er tað ringt at skilja, at hann ikki er her longur, hann, sum altíð var arskur og sunnur. Tað er, sum tú Hans Petur segði, at verðin var ov ljót hjá John at liva í, tí mátti hann flytast til eitt betri stað.

Vit hugsa um tykkum Hans Petur, Fía og Arnbjørn og gleðast saman við ty kkum um øll tey mongu góðu minnini vit hava eftir John.

Við hesum fáu orðum lýsa vit frið yvir minnini um John, og má Harrin styrkja tykkum trý í sorgini.

*– Óttast ikki! Eg eri við tær! Ver ikki mótfallin! Eg eri Gud tín! Eg styrki teg og hjálpi tær og haldi tær uppi við høgru hond rættvísi Mínar!*

*Esaias 41,10*

**Sunfríð, Sunrid og Fríðgerð**



# Halgisberg lopið

*Hildið verður, at Halgisberg, ið er partur av Vestmannabjørgunum, leyp tórsmorgun, stutt áðrenn Sosialurin var undir bjørgunum í bátinum, Silju*

Høgni Mohr

Ein av mongu stórslignu og forvitnisligu støðunum í Føroyum, ið mong ferðafólk hava vitjað á útferðum við Palla Lamhauge í Vestmanna, er latið aftur fyri vitjandi.

Undir fyrsta ferðafólkatúrinum undir Vestmannabjørgunum við bátinum, Silju, fyrramorgunin, varð staðfest, at ein stórur biti av Halgisbergi í Lítlabergsgjógv er rapaður í havið.

Lopið er okkurt um 150 metrar høgt og í meðal einar fimm favnar djúpt.



*Einir 150 metrar av niðara parti av Halgisbergi í Vestmannabjørgunum eru júst lopnir. Nú ber ikki longur til at sigla undir Lítlabergsdrangi.*

**Mynd: Jens Kristian Vang**

### Ongin atgongd

Grótnøgdin í lopinum var so stór, at innsiglingin til holið í Lítlabergsdrangi, sum vanligt er at sigla ígjøgnum, varð byrgt av. Skiparin á Silju hendan morgunin, Jákup Andrias Lamhauge, noyddist tískil so nakkalangur at venda bátinum og stima út aftur sama veg, ið hann var komin. Umframt Sosialin, vóru eini tíggju útlendsk ferðafólk og borgarstjórin í Vestmanna, Gunn Joensen, við á ferðini.

### Ramur brendaroykur

Tað er ikki heilt greitt, nær gjáarbergið er lopið. Men Palli Lamhauge er púra vísur í, at mánadagin 8. mai sigldi hann ígjøgnum holið, sum nú er sperrað av stóra lopinum.

Tá ið Sosialurin og manningin á Silju staðfestu lopið um ellivutíðina tórsmorgun, bendu runudálkaður sjógvur og ramur brendaroykur í gjónni á, at bergið júst var lopið; kanska sama morgun.

### Ongar røkur burtur

Vestmannabjørgini eru mong. Tískil verður fuglalívið í bjørgunum lítið og einki ávirkað av lopinum. Fitt av lomviga eigur í Vestmannabjørgunum, ella eysturi undir Landi, tey kalla; men lomvigarnir halda til á smølum og spjøddum lomvigareygum. Einasta veruliga lomvigarók í Vestmannabjørgunum er sambært staðkendum monnum í Heygadrangi, sum stendur skamt norður úr Lítlabergsdrangi, ið nú so brádliga varð stongdur fyri almennari bátaferðslu.

# Sjómansmissiónin fingið bil frá ITF

Eirikur Lindenskov

Føroyska Sjómansmissiónin hevur fingið stórfingna gávu frá ITF, sum er felagsskapurin hjá altjóða flutningsarbeiðarum. Gávan er ein sjeypersóna bilur.

– Vit eru sera fegin um hesa gávu, sigur Torleif Johannesen, sjómanstrúboðari.

Torleif Johannesen sigur, at sjómansmissiónin roynir at vitja allar havnir - helst tvær ferðir um árið, og tá verður bilurin sera hentur. Umframt at vitja sjómenn, vitjar sjómansmissiónin eisini sjómanskvinnuringarar kring landið.

ITF, sum hevur høvuðsskrivstovu í London, hevur sum fremstu uppgávu at útvega sjómonnum á hentleikaskipum sáttmálar, og hetta virksemið gevur eisini pengar í kassan hjá felagsskapinum - og teir verða nýttir til vælferð hjá sjómonnum, greiðir Torleif Johannesen frá.



*Torleif Johannesen við bilinum - einum Seat Allahambra, sum Sjómansmissiónin hevur fingið frá altjóða flutningsfelagsskapinum, ITF*

**Mynd: Álvur Haraldsen**

Umframt hesa gávuna, so hevur Tórshavnar Sjómansheim fingið stuðul frá ITF til umbyggingina í 90'unum. Sjómansheimið í Reykjavík, Ørkin, fekk ein líknandi bil, tá tað lat upp í 1991, og fleiri sjómansheim í Danmark hava eisini fingið pening til arbeiðið millum sjófólkið.

– Tí valdu vit eisini at søkja. Óli Jacobsen, formaður í Fiskimannafelagnum, er felagsins umboðsmaður í Føroyum, og hann viðmælti umsóknini, sigur Torleif Johannesen, sum leggur afturat, at Óli Jacobsen er ein sera stórur stuðul hjá føroysku Sjómansmissiónini.


-Góðir brúktir frá

REYNI SERVICE

| | |
|---|---|
| **TOYOTA CAMRY 2,2 GL** Sýnaður 04-98<br>**Skrás.:** 02-04-98<br>**Km.:** 24.000<br>**Prísur:** 218.600,- **Garanti**** | **TOYOTA COROLLA 1,6 GSI SEDAN** Sýnaður 01-99<br>**Skrás.:** 22-10-91<br>**Km.:** 171.000<br>**Prísur:** 58.600,- |
| **TOYOTA CARINA 1,8 GLI**<br>**Skrás.:** 10-11-95<br>**Km.:** 90.000<br>**Prísur:** 120.600,- **Garanti*** | **TOYOTA COROLLA 1,3 H/B**<br>**Skrás.:** 13-06-95<br>**Km.:** 82.000<br>**Prísur:** 87.600,- **Garanti*** |
| **TOYOTA CARINA 1,8 GLI** Sýnaður 12-99<br>**Skrás.:** 28-06-95<br>**Km.:** 70.000<br>**Prísur:** 119.600,- **Garanti*** | **TOYOTA STARLET 1,3 XLI, 3 HURÐAR**<br>**Skrás.:** 30-09-97<br>**Km.:** 29.000<br>**Prísur:** 86.600,- **Garanti**** |
| **TOYOTA CARINA 1,6**<br>**Skrás.:** 27-04-95<br>**Km.:** 41.000<br>**Prísur:** 110.600,- **Garanti*** | **HONDA CIVIC 1,5** Stendur í Klaksvík<br>**Skrás.:** 19-11-98<br>**Km.:** 17.000<br>**Prísur:** 127.600,- **Garanti*** |
| **TOYOTA CARINA 1,6** Sýnaður 10-97<br>**Skrás.:** 10-05-95<br>**Km.:** 89.000 Stendur í Klaksvík<br>**Prísur:** 98.600,- **Garanti*** | **FORD ESCORT 1,8 D STW**<br>**Skrás.:** 26-09-95<br>**Km.:** 64.000<br>**Prísur:** 97.000,- **Garanti*** |
| **TOYOTA CARINA 1,6**<br>**Skrás.:** 30-07-90<br>**Km.:** 142.000<br>**Prísur:** 59.600,- | **FORD ESCORT 1,8 DIESEL**<br>**Skrás.:** 01-06-95<br>**Km.:** 149.000<br>**Prísur:** 94.600,- **Garanti*** |
| **TOYOTA COROLLA 1,6 LUNA L/B**<br>**Skrás.:** 25-01-99<br>**Km.:** 21.000<br>**Prísur:** 136.600,- **Garanti**** | **FORD KA**<br>**Skrás.:** 23-05-97<br>**Km.:** 33.000<br>**Prísur:** 78.600,- **Garanti*** |
| **TOYOTA COROLLA 1,3 TERRA**<br>**Skrás.:** 16-03-98<br>**Km.:** 50.000<br>**Prísur:** 122.600,- **Garanti**** | **FIAT FIESTA DIESEL**<br>**Skrás.:** 02-01-96<br>**Km.:** 85.000<br>**Prísur:** 64.600,- |
| **TOYOTA COROLLA 1,3 TERRA L/B**<br>**Skrás.:** 29-09-97<br>**Km.:** 9.000<br>**Prísur:** 117.600,- **Garanti**** | **MITSUBISHI GALANT** Sýnaður 02-00<br>**Skrás.:** 12-06-91<br>**Km.:** 205.000<br>**Prísur:** 62.600,- |
| **TOYOTA COROLLA 1,3 XLI H/B** Sýnaður 02-00<br>**Skrás.:** 23-08-95<br>**Km.:** 80.000<br>**Prísur:** 93.600,- **Garanti*** | **VOLVO 460 SEDAN** Sýnaður 06-99<br>**Skrás.:** 25-05-90<br>**Km.:** 88.000<br>**Prísur:** 65.600,- |
| **TOYOTA COROLLA 1,6 GSI H/B**<br>**Skrás.:** 27-04-90<br>**Km.:** 172.000<br>**Prísur:** 54.600,- | **AVHEINTINGARTILBOÐ**<br>**HONDA ACCORD** Sýnaður 06-99<br>**Skrás.:** 15-08-86<br>**Km.:** 214.000<br>**Prísur:** 7.600,- |

VØRUVOGNAR

**TOYOTA LANDCRUISER HJ61**
**Skrás.:** 31-10-89
**Km.:** 137.000
**Prísur:** 105.600,- **Garanti***

**TOYOTA PREVIA 2400 GLI** Stendur í Klaksvík
**Skrás.:** 27-12-94 Sýnaður 03-98
**Km.:** 58.000
**Prísur:** 98.600,- **Garanti***

**TOYOTA HIACE 4x4**
**Skrás.:** 19-10-87 Sýnaður 07-98
**Km.:** 165.000
**Prísur:** 49.600,-

Støkkið inn á gólvið!

* Brúktir bilar yvir 75.000 kr. verða seldir við BRÚKTBILAVÁTTAN
** TOYOTA bilar hava 3 ára garanti frá fyrstu skrás. dato

REYNI SERVICE

Opið: Mán.-frí. 8.00-17.00




Vegurin Langi -188 Hoyvík - Tel. 313040

Sosialurin - 311820